## Ferðasíðan hjá Sosialinum

# Jólatúrur til Aberdeen

## 14. - 17. des. 07



Fráferðir: 14/12 Vágar - Aberdeen 09.45-11.00
17/12 Aberdeen - Vágar 11.45-13.00

## Hví ikki leypa avstað og uppliva hugnaligu skotsku jólatíðinia?

**Aberdeen hevur nógv at bjóða; bæði ungum og eldri. Býurin hevur eitt ríkt mentunarlív, nógv góð matstøð og hugnaligar »pubbir« og kaféir.**

**Til tey, ið dáma náttarlívið, eru nógv vælumtókt støð í Aberdeen. Tosa vit um »shopping«, so er stórt úrvæl av handlum, bæði lágprís- og merkjuvøruhandlar.**





### The Brentwood Hotel***

The Brentwood Hotel er eitt hugnaligt hotel í miðbynum í Aberdeen, stutt frá stóru handilsgøtuni, Union Street. Kømrini hava baðirúm, tlf, sjónvarp og fønara. Møguleiki er at gera sær drekkamunn á kamarinum.
Á hotellinum er hugnaligur »pubbur« og vælumtókt matstova.

Hotellið er væl vitjað av føroyingum, ið kenna seg vælkomnan av fryntligu starvsfólkunum og hugnaliga dáminum á hotellinum.
Les meira á www.brentwood-hotel.co.uk

**Prísur:**
**kr 3.405,-** fyri hvønn í dupultrúmi
**kr 3.675,-** fyri hvønn í einarúmi

### Skene-house Rosemount***

Skene-house Rosemount bjóðar rúmligar og góðar íbúðir, sum liggja í miðbýnum. Uml. 10 min. til gongu frá handilsgøtuni, Union Street.
Íbúðirnar eru ymiskar í stødd, men hava allar køk, stovu, baðirúm + eitt ella fleiri kømur.
Tær eru vælútgjørdar og hava allar hentleikar t.d. fønara, uppvaskimaskinu, steintoyð til matgerð, strúkijarn/bretti.
Morgunmatur er í íbúðunum.
Les meira á www.skene-house.co.uk

**Prísur:**
**kr 3.585,-** fyri hvønn í 1-rúmsíbúð (2 fólk)
**kr 3.315,-** fyri hvønn 2-rúmsíbúð (4 fólk)



### Patio Hotel ****

Eitt hugnaligt hotel, ið liggur uml.15 min. til gongu frá Union Street.
Hotellið bleiv bygt í 1996 og hevur hugnalig kømur við hentleikum sum t.d. bað, telefon, sjónvarp, fønara, buksupressu, umframt møguleika at gera sær te og kaffi.

Patio Hotel hevur barr og góða matstovu. Eisini er fittnessentur, svimjihylur, gosbað og sauna.
Les meira á www.patiohotels.com

**Prísur:**
**kr 3.675,-** fyri hvønn í dupultrúmi
**kr 4.575,-** fyri hvønn í einarúmi

Íroknað prísirnir er flogferð aftur og fram v/ ferðaavgjøldum og gisting í 3 nætur v/morgunmati
Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum og prísbroytingum

62°N travel

Hoydalsvegur 17 • 100 Tórshavn • Tel: 34 00 00
Fax: 34 00 11 • booking@62n.fo • www.62n.fo